# ítróttur

Nr. 198 • leygardagur • 13. oktober 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo


# TB skal takast í fullum álvara




*Italienski venjarin hjá TB, Leoni Emanuele, sambúgvi hansara, 33 ára gamla Lily Popescu úr Rumenia, sum skal spæla við, Anna Nolsøe, formaður í TBF og 20 ára gamla Maja Popovic úr Bosnia-Herzegovina, sum eisini skal spæla við*

**Kvinnurnar hjá TB hava veruliga gjørt seg til í ár, og liðið eigur at roknast sum ein hin fremsti FM-kanditaturin**

FLOGBÓLTUR

*Jákup Mørk*

Flogbóltslandskappingin fer í gongd um vikuskiftið, og tað er ikki sørt, at stórur spenningur longu nú er um, hvønn veg gullmerkini fara, tá avtornar.

## TB riggar til

Hjá kvinnunum vóru tað í fjør serliga Dráttur og Mjølnir, sum gjørdu um seg. Dráttur vann, tá saman um kom føroyameistaraheitið, men í steypafinaluni máttu tær lúta fyri 2-3 Mjølni, eftir at tær annars høvdu verið á odda 2-0.

Sjálvndi skulu hesi bæði liðini eisini takast í álvara, men í ár er líkt til, at kappingin fer at verða hørð frá fleiri av hinum liðunum.

Serstakliga er tað TB, sum í ár hevur gjørt seg til. TB hevur ígjøgnum fleiri ár havt sera góð ungdómslið, men tá fleiri av leikarunum er farin antin til Havnar ella til Danmarkar at lesa, hevur gingist illa við at umseta góða ungdómsarbeiðið til úrslit í vaksnu deildunum.

Nú er tó líkt til, at hetta bert er søga. TB hevur í ár fingið útlendskan venjara, og harafturat koma tvær útlendskar kvinnur at spæla við liðnum.

Venjarin er italienarin, Leoni Emanuele og tær báðir spælararnir eru sambúgvi hansara, Lily Popescu úr Rumenia, hon er 33 ár, og 20 ára gamla Maja Popovic úr Bosnia-Herzegovina. Maja er annars systur leikandi venjaran hja Drátti í fjør, Maryna Popovic, sum eisini gjørdist ársins leikari.

Hóast hon bara er 20 ár, hevur hon longu roynt seg sum professionella, hon var eitt stutt skifti í Týsklandi, har hon spældi í Leipzig. Men tað dámdi henni onki serligt, umhvørvið var kalt, hon hevði onki samband við nakran av hinum á liðnum, kendi seg einsamalla og longdist illa heim. Tì gavst hon og fór heimaftur eftir fáum vikum. Tey siga, at henni dámar stak væl í Føroyum, tey stórtrívast og tvørafólk taka sær væl av teimum útlendsku spælarunum og so hevur hon eisini systrina nærhendis.

At TB skal takast í álvara var sjónligt í Fleyr-kappingini seinasta vikuskiftið. Her vann TB kappingina, og ikki nóg mikið við tí. Tær vunnu allar dystirnar 3-0, og vóru bæði Mjølnir og Dráttur ímillum mótstøðuliðini. Tað skal tó nevnast, at hópurin hjá TB í ár tykist sera tunnur, og skal tískil ikki so nógv til, fyrr enn liðið av álvara viknar.

Sum nevnt, so verða tað serliga Mjølnir og Dráttur, sum fara at geva TB kapping í oddinum. Dráttur hevur eins og í fjør útlendskan styrk á liðnum, og so er spurningurin, um tað framhaldandi er nóg mikið við heimligu leikarunum hjá Mjølni.

Hini trý liðini í deildini, Fleyr, ÍF og Fossánes skulu sjálvandi ikki forsmáast í øllum hesum, men lítið er at ivast í, at tey koma at kappast um plássini uttan fyri heiðursmerkjarøðina.

## SÍ er spennandi

Hjá monnunum stóð kappingin í fjør ímillum fyrst og fremst Mjølnir og ÍF, men eisini Fram og Fleyr vóru til tíðir væl við, og tað vóru eisini úrslitini ímóti hesum feløgum, sum avgjørdu meistaraheitið.

Tá var tað bert SÍ, sum at kalla datt uttan fyri fína selskapið, men nú eru sørvingar so dyggiliga troyttir av hesum. Borko Ilic hjá Mjølni er fingin til felagið, og harafturat hava sørvingar fingið hendur á enn einum jugoslava, so líkt er til, at talan verður um eitt sera sterkt lið hetta kappingarárið. Hetta varð eisini staðfest í Fleyr kappingini, har SÍ ikki gjørdi mætari enn at finna finaludystin, sum var ímóti Fram.

Eisini Fleyr hevur riggað seg eitt sindur til, soleiðis at teir nú aftur hava ein útlendskan venjara, og spurningurin er so, um hetta er nóg mikið til at skapa tann stabilitetin í spælinum, sum í alt ov stóran mun restaði í hjá teimum í fjør.

Sum nevnt eru hini liðini í deildini eisini sterk, og helst fæst ein ábending um, í hvussu stórum álvara hóttanin frá SÍ skal takast, tá teir í fyrsta umfarinum taka ímóti greipuvinnarunum frá í fjør, ÍF.

## Dystir hetta vikuskiftið:

**Hondbóltur**

1. deild kvinnur

| Dagur | kl. | dystur | dómarar |
|---|---|---|---|
| 14.10 | 14.30 | Kyndil-Neistin | Poli/Jústines |
| 14.10 | 14.30 | VB-VÍF | Hannis/Uni |

**1. deild menn**

| Dagur | kl. | dystur | dómarar |
|---|---|---|---|
| 14.10 | 16.00 | Kyndil-Neistin | Poli/Jústines |
| 14.10 | 16.00 | KÍF-VÍF | Kári/Trúgvi |

**Flogbóltur**

1. deild kvinnur

| Dagur | kl. | dystur | dómarar |
|---|---|---|---|
| 13.10 | 10.30 | ÍF-Dráttur | Fossánes |
| 13.10 | 13.00 | Mjølnir-TB | Fossánes |
| 14.10 | 15.00 | Fossánes-Fleyr | ÍF |

1. deild menn

| Dagur | kl. | dystur | dómarar |
|---|---|---|---|
| 13.10 | 14.00 | SÍ-ÍF | Fleyr |
| 13.10 | 15.00 | Mjølnir-Fram | Fleyr |



# Meistararnir fara ígongd

*Í fjør mest sum tryggjaði VÍF sær gullið við sigrinum í Vági. Hesa ferð verður talan um eina strævna byrjan, tá tær í fyrsta umfarinum vitjað fremsta sambiðilin til gullið*



**Føroyameistararnir úr VÍF seta sjøtul á landskappinga um vikuskiftið, og ikki minst tykist talan gerast um ein spennandi kvinnudyst í Vági**

### Støðan 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 1 | 1 | 0 | 0 | 28 | 16 | 12 | 2 |
| 2 | Stjørnan | 1 | 1 | 0 | 0 | 32 | 27 | 5 | 2 |
| 3 | VB | 1 | 1 | 0 | 0 | 23 | 20 | 3 | 2 |
| 4 | VÍF | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 5 | Sóljan | 1 | 0 | 0 | 1 | 20 | 23 | -3 | 0 |
| 6 | Kyndil | 1 | 0 | 0 | 1 | 27 | 32 | -5 | 0 |
| 7 | StÍF | 1 | 0 | 0 | 1 | 16 | 28 | -12 | 0 |

### Støðan 1. Deild menn

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kyndil | 1 | 1 | 0 | 0 | 24 | 21 | 3 | 2 |
| 2 | H71 | 1 | 1 | 0 | 0 | 28 | 26 | 2 | 2 |
| 3 | Neistin | 1 | 1 | 0 | 0 | 25 | 24 | 1 | 2 |
| 4 | VÍF | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 5 | StÍF | 1 | 0 | 0 | 1 | 24 | 25 | -1 | 0 |
| 6 | KÍF | 1 | 0 | 0 | 1 | 26 | 28 | -2 | 0 |
| 7 | Tjaldur | 1 | 0 | 0 | 1 | 21 | 24 | -3 | 0 |

UPPTAKT

*Jákup Mørk*

Í Vestmanna hava tey bíða eina viku longri enn alla aðra staðni, tá talan er um fyrstudeildarhondbólt. Sunnudagin fara tó bæði kvinnur og menn í eldin, og ivaleyst ætla bæði liðini at verja FM-gullið, sum tey vunnu so trygt í vár.

## Alt tykist spennandi

Hjá kvinnunum tykis talan hetta vikuskiftið at gerast um tveir ógvuliga spennandi dystir.

Á Hálsi í Havn verður lokaluppgerð, tá Kyndil og Neistin fara at takast. Eftir at Kyndil eitt skifti í 90’unum vann sær eitt yvirtak í hesum uppgerðum, hevur Neistin oftast verið omaná tey bæði seinnu árini.

Nú tykist Kyndil tó aftur at vera styrknað nakað, og tó at tær taptu fyrsta dystin á árinum, so boðar tað kortini frá góðum, at tær eitt skifti vóru um at koppa Stjørnuni á heimabeiti. Neistin tykist hava á leið somu styrki, sum tey undanfarnu árini, so spennandi sær tað í øllum førum út.

Á Skála skuldu uppflytararnir tey bæði seinastu árini av røttum dystast, men hesin dystur er nú útsettur til mikudagin, 31. oktober. Orsøkin sigst vera, at høllin á Skála ikki er tøk sunnudagin, men einki er at ivast í, at hetta fer at koma væl við hjá skálafólki. Leygardagin kann nevnliga roknast við, at fótbóltsliðið á vestara arminum fyri fyrstu ferð fær sæti í bestu deildini, og so er lítið at ivast í, at talan verður um opið hús.

Seinni dysturin verður tann í Vági, og føroyameistararnir úr VÍF kundu neyvan fingið eina harðari byrjan upp á kappingarárið. Seinnu árini hevur VB støðugt nærkast føroysku hondbóltstindunum, og eftir tvær taptar steypafinalur á rað, halda tey í Vági helst, at nú er tíðin komin, til at okkur stórt skal henda. Í fjør varð liðið í stóran mun skert av skaðum, men nú allar eru tøkar aftur tykist liðið hava funnið røttu styrkina. VÍF ætlar sær hinvegin uttan iva at endurvinna gullmerkini, og í so máta kann dysturin í Vági helst geva eina sera góða ábending um, hvussu fer at gangast við hesum.

## Fleiri styrkisroyndir

Hjá monnunum eru somuleiðis tveir dystir á skránni, og her tykist talan í øllum báðum førum at gerast um eina styrkisroynd hjá nøkrum av liðunum, sum ætla sær í oddin hetta kappingarárið. Tríði dysturin skuldi verið ímillum StÍF og H71, men eins og hjá kvinnunum verður hesin dystur útsettur til seinasta dagin í oktober.

Á Hálsi má Neistin metast sum favorittur móti Kyndli. Neisitn hevur í ár styrkt sær nógv um hópin, og millum annað er hetta gjørt við fólki úr Kyndli, sum hevur mist heitt fitt av fólki. Tískil eru teir grønu nú í ferð við at byggja eitt nýtt lið upp, hetta átti Neistin at kunna gjørt sær dælt av, men hinvegin kann einki takast fyri givið í eini lokaluppgerð.

Hin dysturin sunnudagin verður í Vestmanna, har kollfirðingar framvegis eiga heimavøll. KÍF sýndi í fjør, at teir hava fólkið til at gera um seg í oddinum, men úrslitini vóru tó ov óstøðug, og ikki minst í fyrru kappingarhálvu lá heilt illa fyri hjá teimum. Í Vestmanna gekk hinvegin upp á stás, og liðið gjørdist ein greiður føroyameistari, og ivaleyst ætla teir eisini at so skal verða í ár. Móti KÍF fær liðið sína fyrstu styrkisroynd, og so er spurningurin, hvussu hetta fer at tørna út.